Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Upptøka av lesandi til SJÚKRARØKTARFRØÐING

**Nýggjur flokkur byrjar 4. februar 2008.
Umsóknarfreistin er 5. november 2007**

**Útbúgving og møguleikar**
Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði – Bachelor of Science (BSc) in Nursing. Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar innan heilsuverkið bæði her á landi og uttanlands.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú upplivir, at tú veruliga kanst gera mun.

**Hølis- og lestrarumstøður**
Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og seinni søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum fluttu fyrr í hesum árinum í nýggj nútímansgjørd høli miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**
Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er:
anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**
Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 5. november 2007 og verða sendar til

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn**

merk brævbjálvan: »Umsókn lesandi«

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
**Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo**

# AT. H & J

Søkt verður eftir 2 húsasmiðum til Danmarkar (Keypmannahavn), at byrja í okt. '07. Nógv arbeiði fyri framman. Til at hoyra nærri vinarliga ring til:

**André:** .................. +45 20 71 62 23

**Bragi:**..................... +45 20 71 62 24

# Sandvíkar skúli

Lýst verður eftir einum tímalærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna avlopstímar.

Tímalærarin undirvísir 10 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir einum tímalærara sum:**

- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim.
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar og at samstarva.
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2 – 30.2.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Sandvíkar skúla í hendi í seinasta lagi 5. oktober 2007 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar til tímalærara starvið, kunnu ringja til einalæraran Nitu Næs á tlf. 375917.

# SØLUFÓLK

Søkt verður eftir einum sølufólki til Farpack. Vit síggja fyri okkum ein reiðiligan og fyrikomandi persón, ið hevur góð samstarvsevnir, arbeiðir miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

Talan er um eitt spennandi starv, har tú hevur nógv við fólk at gera. Tú vitjar kundar og fæst við innkeyp, sølu og flutning av okkara vørum.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn kann sendast til okkum innan 5.oktober 2007.

Nærri upplýsningar kunnu fáast við at venda sær til Eyðun Olsen á tlf 353008 / 219898 ella á e-mail eydun@farpack.fo

**Farpack** hevur skrivstovu og goymslu á Smyrilsvegi 5 í Tórshavn. Vit útvega eitt stórt úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp, plast, klæðum og øðrum vørum til øll vinnuøkir.

Fiskavirkir og fiskiskip eru millum okkara stóru kundar. Vørurnar vera fyri tað mesta innfluttar úr Norðurlondum og úr øðrum londum. Farpack er ISO 9001:2000 góðkent av Det Norske Veritas og lýkur altjóða krøv til keyp, marknaðarføring, sølu og flutning av pakningi og øðrum vørum til fiskivinnu og annan ídna.

FARPACK

**Smyrilsvegur 5 · Postboks 3099
FO-110 Tórshavn · Tlf. 353000 · Fax 353010
farpack@farpack.fo · www.farpack.fo**

Beinleiðis frá framleiðara

**_Arbeiðshandskar_**
**_til øll endamál - bæði á sjógvi og landi_**

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

**ADC**-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# Húsavørður

Starv sum húsavørður hjá politinum í Tórshavn er leyst at seta 1. november 2007.

Arbeiðstíðin er 15 tímar pr. viku.

Løn verður veitt eftir galdandi sáttmála við Fíggjarmálaráðið.

Ynskiligt er, at viðkomandi hevur handverkaraútbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á telefon nr. 35 14 48, lokal 2100.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 12. oktober 2007.

**FØROYA LANDFÚTI**
***tann 26. september 2007***
***Karen Marie Olesen***

Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Vaskifólk
## til Glyvra skúla

Søkt verður eftir einum vaskifólki, til skúlan á Glyvrum at byrja 22/10-2007, ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er 3 tímar um dagin.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 12/10-2007.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlavørðin á tlf. 213436

# Handilsbygningur til sølu

Handilsbygningur við Klaksvíksveg 34 til sølu, um hóskandi boð fæst. Bygningurin er í trimum hæddum og hvør hædd er 48m$^2$.

**Tlf. 456428 ella 220606**

# Nissan Primera 2.0 til sølu

Bilurin sær gott út, koyrir væl, og hevur havt ymsar smærri umvælingar.

Hevur koyrt 187.000 km og er sýnaður í apríl 2006. Skrásettur fyrstu fer: Desember 1991

Umframt summardekk, fylgja píkadekk á felgum við. Til sølu fyri 15.000 kr.

**Tlf. 22 10 70**